## Petti duttu av rúmdarferjuni

Nøkur petti duttu av amerikonsku rúmdarferjuni Endeavour, tá hon bleiv skotin út í rúmdina í gjárkvøldið, men sambært rúmdarumsitingini NASA elvir tað ikki til nakran ótta har. NASA sigur tó, at ferjan verður kannað gjølla, áðrenn hon kemur aftur. Bill Gerstenmaier hjá NASA sigur við amerikanskar fjølmiðlar, at tey vita ikki við vissu, hvat tað var, sum datt av ferjuni, men at talan kann vera um íspetti ella petti av bjálvingini. Hann sigur, at pettini duttu av Endeavour einar tveir minuttir, eftir at ferjan var farin uppfrá. Fyri seks árum síðani sprongdist rúmdarferjan Columbia, tí petti av bjálvingini duttu av undir útskjótingini. Øll tey sjey umborð doyðu.



## Selja grønlendskan ís

Gongst sum ætlað sleppa fólk í Kanada skjótt at drekka vatn úr grønlendskum innlandsísi. Grønlendska blaðið AG skrivar, at landsstýrið hevur givið kanadiska felagnum Iceberg Canada Corporation loyvi til at høggja innlandsís nærhendis Narsaq og Nuuk. Tá ísurin er bráðnaður, verður vatnið latið í fløskur og selt sum drekkivatn í handlunum í Kanada. Iceberg Canada Corporation selir sum er drekkivatn av ísi úr Ný Funnalandi, men felagið heldur, at nógvir kanadiumenn vilja sleppa at royna okkurt meiri spennandi so sum vatn av grønlendska innlandsísinum.

# Høgni situr modell

**Av sínum eintingum er myndahøggarin Andreas Andreasen farin undir at gera standmynd av Høgna Hoydal**

LIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Týsdagin var Høgni Hoydal í serligum ørindum á skipasmiðjuni í Havn.

Hann hevði avtalað við myndahøggaran Andreas Andreasen um at koma og sita modell henda dagin í ein tím. Hetta var annar tímin, og hann kann vænta at skulu sita soleiðis í samanlagt 10 til 15 tímar, tí so nógva tíð skal litamaúrin hava fyri at kunna gera eina standmynd.

Andreas Andreasen bað sjálvur Høgna Hoydal um at kunna gera eina standmynd, og Høgni Hoydal játtaði beinanvegin. Tað var júst, sum Andreas Andresen fyri tveimum árum síðan gjørdi standmynd av Torbjørn Jacobsen, og Høgni Hoydal ein dag var til staðar, meðan partamaðurin sat modell.

Andreas Andreasen heldur, at tað er stuttligt at gera standmynd av Høgna Hoydal líka sum tað var at gera standmyndina av hinum manninum, tí báðir hava flottan profil.

### Gjørt fleiri standmyndir

– Tað er av tilvild, at eg geri standmynd av tveimum tjóðveldismonnum. Eg havi gjørt standmyndir av fleiri øðrum fólk sum eitt nu Janusi Kamban, Amariel Norðoy og Regin Dahl, sigur Andreas Andreasen.

Hann sigur, at hann onkuntíð hevur gjørt standmyndir av børnum, men tað er ein torfør uppgáva, tí børn orka ikki at sita still so leingi.

Høgni Hoydal heldur tað vera stuttligt at sita modell hjá Andreasi Andreasen. Tað gevur honum gott innlit í, hvussu listafólk arbeiða.

Standmyndin av Høgna Hoydal er ikki seld, og skoytir Høgni Hoydal um hana, so fær hann hana til keyps.

- So langt havi eg ikki hugsað, sigur Høgni Hoydal, sum ongan ótta ber fyri, at hann verður misnøgdur við úrslitið. Hann hevur sæð onnur verk hjá Andreasi Andreasen og hevur dámt tey væl.

- Hann er ein stórur myndhøggari, sigur Høgni Hoydal.



*Høgni Hoydal situr tolin sum modell hjá Andreasi Andreasen*
*Mynd: Beinta Haraldsen*

# Poul Mohr er trekur



*Skitsan hjá Torbjørn Olsen stendur í hálvum gekki*
*Mynd: Beinta Haraldsen*

**Listamaðurin Torbjørn Olsen droymir um at sleppa at gera ein málning av fyrrverandi skipasmiðjustjóranum Poul Mohr, men Poul Mohr hevur lítlan hug at spæla við**

LIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Torbjørn Olsen telist millum teir listamenn, sum hava arbeiðshøli á skipasmiðjuni í Havn.

Í hølunum hevur hann liggjandi byrjanina upp á eina skitsu, og hann vóna ein dag at kunna fullføra ætlaða málningin út frá skitsuni.

Men illa gogdur at fáa skitsuna gjørda lidna.

- Tað byrjaði við, at Poul Mohr ein dag kom inn á gólvið, og eg bað hann seta seg niður, tí eg vildi gera eina skitsu av honum. Hann seti seg niður, men sat bara eitt korter, tí hann tímdi ikki meira, sigur Torbjørn Olsen.

Hann hevur spurt Poul Mohr um at koma aftur, men Poul Mohr hevur verið trekur, tí hann heldur tað ikki vera neyðugt at mála seg.

Tað er Torbjørn Olsen harmur um.

- Poul Mohr er so karikaristiskur, og hann er eitt kent andlit. Tí átti ein málningur at verið gjørdur av honum, sigur Poul Mohr.

Men Poul Mohr er ikki samdur.

- Eg eri einki at mála, sigur hann.